# So varpar Televarpið

**Hóskvøldið varð alment tendrað fyri Televarpinum, og harvið fingu føroyingar møguleikan at síggja 26 sjónvarpsrásir við at tekna seg fyri hald hjá Televarpinum**



*Tróndur Djurhuus, stjóri í Televarpinum, Andras Róin, nevndarformaður, og Jan Christiansen, býráðsformaður í Havn, tá Televarpið seinasta fríggjadag tók yvir ognirnar hjá Rás Tórshavn, sum nú er farin í søguna*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Umsíðir upprann dagurin, tá havnarborgarar fáa høvi at síggja sjónvarp frá Televarpinum. Tróndur Djurhuus, stjóri á Televarpinum sigur, at tey gleða seg til at kunna veita okkum fleiri sjónvarpsrásir uttan størvegis hóvasták. Við eini vanligari UHF-antennu og einum móttakara, sum er lættur at seta til, kanst tú taka móti 25-30 sjónvarpsrásum frá Televarpinum. Also: fleiri rásir - einki roks! Treytin er bert, at tú býrt í einum av útbreiðsluøkjunum hjá Televaprinum, sum gerast fleiri sum fráliður.

– Í TV-pakkunum finnur tú 21 rásir, harav 19 útlendskar rásir, sum nøkta tørvin og áhugan hjá allari familjuni. Her er barnatilfar, filmir og undirhald, tónleikur, ítróttur, náttúruvísindaligt og annað vísindaligt tilfar umframt tíðindi og dokumentartilfar uttan úr heimi alt samdøgrið, sigur Tróndur Djurhuus.

Tey, ið eru sinnað at gjalda eitt sindur meira, kunnu harafturat velja millum Danmarks Radio við tí dygdartilfari, sum har er, og Canal+ við teimum fremstu filmunum og raðsendingunum umframt fótbólt í Premier Leaugue.

– Ikki sørt av føroyingum eru Manchester United-fjepparar. Teir kunnu afturat TV-pakkanum keypa atgongd til sjónvarpsrásina hjá yndisfelag sínum, vísir Tróndur Djurhuus á.

Sjónvarp Føroya verður eisini lagt út á netið hjá Televarpinum, uttan at haldarar gjalda eyka fyri tað.SvF verður jú goldið við sjónvarpsgjaldinum beinleiðis til stovnin. Ein fyrimunur er, at haldarin kann skifta til SvF við somu fjarstýring, sum hon ella hann brúkar til hinar rásirnar. Neyðugt verður tá heldur ikki við meira enn einari antennu.

Televarpið fevnir harafturat um eina eyka rás, sum tey hava valt at nevna Rás 1. Henda rásin verður løgd av til at kunna senda føroyskt tilfar á. Fleiri initiativ eru til at brúka hesa rásina, og ein serlig verkætlan kannar í løtuni áhugan og møguleikarnar at fáa brúkt Rás 1 á ein skilagóðan hátt. Televarpið varð alment tendrað í gjárkvøldið, 5. desember og í morgun ber havnarfólki og kaldbaksfólki til at tekna seg sum haldarar hjá Televarpinum.

– Vit fáa væntandi sent til kollfirðingar stutt eftir ársskiftið. Sendararnir til Kollafjørð koma til landið stutt fyri jól. Síðani skal Televarpið gera nakrar royndir til tess at finna besta staðið at seta nýggjar sendarar, so øll í Kollafirði, á Signabø og Norðuri í Sundum síggja. Higartil hava summi ikki sæð Rás Tórshavn, sigur Tróndur Djurhuus.

Útkalt verður kortini ikki í Kollafirði og har um leiðir fyrstu tíðina, av tí at Rás Tórshavn fer at senda frá Svínaryggi, til Televarpið er til reiðar. Stutt eftir nýggjár ætla vit eisini at senda av Støðlafjalli og av Brúnaskarði. Hetta merkir, at klaksvíkingar og ein stórur partur av eysturoyingum tá eisini kunnu gerast haldarar hjá Televarpinum.

Sum fráliður er ætlanin at økja um útbreiðsluøkini. Væntandi fer Televarpið eisini at kunna veita aðrar spennandi tænastur seinni.

Tøkniligu fortreytirnar fyri at taka móti tænastuni frá Televarpinum eru ein set-top box, sum er góðkend av Televarpinum (digitalur móttakari við dekodara) og ein hóskandi UHF-antenna, sum vendir antin móti høvuðsstøðini undir Varða ella øðrum sendistøðum hjá Televarpinum (í Nólsoy, á Sandvíkahjalla, á Svínaryggi við Kjalnes ella á nýggjum sendistaði nærhendis Oyrareingir). Harafturat er neyðugt, at tú teknar eitt hald hjá Televarpinum.

– Vit mæla tær í hesum sambandi til at lesa viðskiftatreytirnar (herundir gjaldstreytirnar) og aðra viðkomandi kunning, sum eru at finna á hesi heimasíðuni. Eisini finnir tú eitt yvirlit yvir tær sølubúðirnar, sum eru góðkendar til at selja haldini og tær set-top boksirnar, sum Televarpið góðkennir, sigur Tróndur Djurhuus.

Ynskir tú fleiri upplýsingar, ert tú vælkomin at ringja til haldaratænastu okkara, sum hevur tlf.nr. 340340, sigur Tróndur Djurhuus, stjóri í Televarpinum.

